

Asbjørn Lómaklett

# Fólkapensjónsránið! Fólkapensjónin, ið hvarv

Í virkna lívi tínum hevur tú goldið til fólkapensjónina á sama hátt, sum øll onnur, og heitið sigur sjálvt, at hetta fór at vera nakað, ið øll fingu eftir loknan »arbeiðsdag«.

Fólk, ið hava havt egna pensjónsuppsparing í sambandi við føstu lønina, hava tó ikki fingið fulla fólkapensjón, men bert sjálva grundarupphæddina + samhaldsfasta. Samstundis hevur hjúnarfelagi bara fingið grundupphæddina av fólkapensjónini. Soleiðis hevur skipanin verið eitt nú hjá tænastumannasettum persónum.

### Lívsløn tænastumanna

Tænastumannasett fólk hava fingið lívsløn. Hetta merkir, at meðan tey vóru í starvi, fingu hesi heldur minni í løn enn onnur í tilsvarandi størvum júst vegna tess, at tey skuldu hava løn alt lívið, men sjálvandi var endalønin væl lægri enn lønin í virkna tíðarskeiðinum. Hesi fólk guldu skatt sum øll onnur. Tað var tí hildið rímiligt, at tey eisini fingu nakað av fólkapensjón. Hetta toldist kortini ikki, og meginparturin av grundarupphæddini varð mótroknað í egnari pensjón, so nettovinningurin kom bert at vera u.l. 800 kr um mánaðin.

### Nú skal knúskast enn meira

Jantulógin er kortini ikki nøgd, av tí at nú skal skerast inn á bein. Grundarupphæddin upp á 3313 kr, sum í veruleikanum longu frammanundan er drigin frá egnu pensjónini, skal nú strikast og í veruleikanum dragast frá enn einaferð + nakað afturat, so tænastumannasettir pensjónistar fara at missa u.l. 4000 kr um mánaðin við ein brest. Hetta er gróthart og hóskar ikki til eitt fólkaræði. Eitt slíkt inntriv minnir ikki sørt um ognartøku, av tí at tænastumannasett fólk hava í virknu tíð síni roknað við hesi inntøku sum part av lívslønini.

### Eri ikki ímóti betri pensjónsskipan fyri øll

Taki fult undir við, at vit her á landi fáa eina betri eftirlønarskipan fyri øll, men hetta eigur ikki at fíggjast við at offra nakrar árgangir av pensjónistum, ið verða tilvildarliga útvaldir og illa viðfarnir av lógevarunum. Stórar broytingar í eftirlønarviðurskiftunum hjá pensjónsbólkum mugu fara fram yvir hóskandi drúgva tíð, so bæði eldri og yngri fáa stundir at tillaga seg. Hetta sømir seg fyri demokratisk lond, har fólk eiga at hava virðing hvør fyri øðrum og fara sømiliga fram. Fyriliggjandi ætlan tekur als ikki hædd fyri »virðingini«, men sær út sum eitt slag av hevnd: Hvør skal siga, at nú skulu hasir tænastumannap ensjónistarnir fáa tað. **Havi annars einki ímóti at fíggja hægri fólkapensjón við hækkaðum landsskatti, ið øll rinda lutfalsliga til. Annars ljóðar fíggingaruppskot pensjónistafelagsins eisini sera skilagott.**

### Hava tryggjað sjálvan seg

Um nøkur ár, tá fjøldin av løgtingslimunum koma í pensjónsaldur, verður myndin ein heilt onnur. Nú hækkar mótrokningarfría upphæddin heilt upp á nær um 660.000 kr (gift) og 883 000 kr (ógift), áðrenn nakað oyra verður mótroknað í pensjónini. Hetta er sera órættvíst móti teimum árgangunum, sum eru eftirløntir í dag og komandi árini, og hvørs mótrokningarfría upphædd bert er ein brotpartur av nevndu tølum.

### Tað undrar meg, at andstøðan stuðlar

Tað er sera undrunnarvert, at andstøðan tekur undir við einum so vánaligum uppskoti uttan at seta rættvísar fíggingartreytir við. Um tað er ynskiligt hjá »breiðusamgongu« at fáa andstøðuna við, so átti henda at sett sum minsta krav, at **allar breiðastu herðarnar** í landinum skuldu fíggja pensjónsreformin, sum tað so flott eitur, og ikki bert nakrir óhepnir, útvaldir árgangir av pensjónistum.

---



Bjørt Samuelsen
*løgtingskvinna*

# Vit hava ikki ráð at spara í menningarhjálpini!

Ímyndi tykkum avleiðingarnar, um stjórnarleiðarar kring heimin boðaðu frá, at londini nú fóru at skerja menningarhjálpina við einum triðingi. Tað ætlar ABC-stjórnin, hóast Føroyar einans lata ein evarska lítlan brotpart av tí, ST mælir framkomnum londum at lata í menningarhjálp.

Ríkis- og stjórnarleiðarar hittust í vikuni til ST-toppfund um fátækradømi. Avbjóðingin er risastór. ST-londini hava bundið seg til at stríðast fyri at basa hungri og fátækradømi kring allan heim. Ávegismálið er, at í 2015 skal talið av teimum, sum svølta og liva undir fátækramarkinum vera komið niður í eina helvt.

Hesaferð eydnaðist at oyramerkja á leið 230 milliardir krónur til serstakt átak at bøta um heilsuna hjá kvinnum og børnum. Lond sum USA, Kina, Frakland, India og Týskland lata sín sjálvsagda lut, men eisini lond Afganistan og Sambia grava djúpt til tess at finna pengar til felags átøkini, sum væntast at bjarga lívinum hjá fleiri enn 15 milliónum børnum komandi fýra árini.

### Hava vit nakra ábyrgd?

ABC-landsstýrið ger beint hitt øvugta og fer at skerja menningarhjálpina við einum heilum triðingi. Úr smáum trimum niður í ósjónligar tvær milliónir krónur árliga. Av eini fíggjarlóg uppá 4,6 milliardir. Hetta hóast vit áttu at meira enn tíggjufaldað okkara menningarhjálp, fyri at verið á hædd við tey 0,7% av BTI, sum ST mælir heimsins londum at lata í menningarhjálp.

Hóast glottar eru at hóma, so liva framvegis ein milliard menniskju undir hungursmarkinum. Fleiri hundrað milliónir børn fara svong til songar. Og árliga doyggja børn í túsundatali av banalum sjúkum orsaka av mat- og vatntroti. Men limalondini í ST trúgva framvegis uppá, at tað ber til at koma hungri og fátækradømi til lívs. Fremsta treytin er tó, at stjórnirnar í hvørjum einasta av heimsins londum taka ábyrgd á seg.

Høvdu aðrir stjórnarleiðarar og ráðharrar við ábyrgd fyri menningarhjálp havt sama hugburð, sum Kaj Leo Johannesen og Jørgen Niclasen, so kundi ST pakka burtur alla stremban at basa svongd og armóð. Men hesir stjórnarleiðarar – frá Obama og Stoltenberg til Mercel og Karzai – vita, at heimsins lond røkka ongum framburði við at fráskriva sær altjóða ábyrgd. Tað gera Føroyar heldur ikki. Fíggjarkreppa og hall á fíggjarlógini kunnu als ikki nýtast sum undanførsla her. Vit eru ikki harðari rakt, enn onnur lond, heldur tvørtur ímóti. Og heldur ikki vit hava ráð at sleppa medábyrgdini fyri teimum, sum eru allar ringast fyri í heiminum.

### Hvør tekur ábyrgdina?

Tað kom sera dátt við, tá løgmaður til munnligan fyrispurning frá undirritaðu 1. september svaraði, at hann sjálvandi stuðlaði landsstýrismanninum í avgerð hansara, at skerja í kontuni til menningarsamstarv og niðurraðfesta arbeiðið við menningarhjálp í Uttanríkisráðnum. Hetta vísir tíverri ógvuliga greitt, hvat virðisgrundarlag hendan stjórnin byggir á.